Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Bíðilistar hjá sjúkrahúsverkinum

Spurningar:

1. Hvussu long er bíðitíðin til ymisku viðgerðirnar hjá sjúkrahúsverkinum?
2. Er bíðitíðin á psykiatriska deplinum longri enn ½ ár?
3. Hvør ítøkilig loysn er í umbúna fyri at minka um bíðilistarnar?

Viðmerkingar:
Tað hevur javnan verið frammi um stóru bíðilistarnar á ávísum viðgerðum í heilsuverkinum. Hetta ávirkar nógvar geirar í samfelagunum og ikki minst familjurnar, sum bíða.

Skúlar royna at skipa viðurskiftini til tørvin hjá næmingunum við serligum avbjóðingum. Hetta er ofta, meðan næmingarnir bíða eftir eini útgreining og einum betri tilboði. Ofta skal ein útgreining til fyri at fáa nøktandi hjálp, m.a. til fleiri stuðulstímar ella øðrvísi skúlatilboð.

Tí er tað bíðilistin, sum ger, at m.a. skúlabørn ikki fáa nøktandi karmar ella hjálp í skúlanum. Henda gongd er óivað eisini á øðrum økjum, m.a. barnagarðsøkinum.

Hesin fyrispurningurin verður settur fyri at fáa yvirlit yvir støðuna.

Á Løgtingi, 8. februar 2022

Jóhannis Joensen